# Marknaðarføring kann hækka støðið á bókmentum

**Lítil ivi er um, at marknaðarføring uttanlands kann verða við til at hækka støðið í føroyskum bókmentum. Fyrsta treytin er tó, at Mentamálaráðið tekur hesa uppgávuna í størri álvara enn higartil, kom millum annað fram á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum herfyri um marknaðarføring av bókmentum á smáum málum**

RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*- Fleiri týðingar kunnu uttan iva verða við til at hækka støðið á føroyskum bókmentum, við tað at ein ávís úrveljing fer fram og lesarafjøldin verður tess størri, sigur Niels Jákup Thomsen, stjóri á Bókadeild Føroya Lærarafelags*

Í setanarrøðuni á ráðstevnuni var Jógvan á Lakjuni rættiliga bjartskygdur, tá tað ræður um støðuna hjá føroyskum bókmentum í alheims høpi.

- Nógv talar fyri, at tað í framtíðini fer at eydnast okkum at marknaðarføra okkara bókmentir. Vit hava dygdina, tað ektaða og eina sterka bókmentaliga siðvenju. Tað er okkara skylda at bera hesar bókmentir víðari til onnur lond, segði mentamálaráðharrin.

Hetta krevur, legði hann afturat, at vit eru virkin og seta okkum nøkur mál fyri, hvat vit vilja við okkara bókmentaliga samskifti ella bókmentaútflutningi, og at vit leggja eina ætlan fyri, hvussu vit náa hesum málum.

### Kann hækka støðið

Fá mundu vera ósamd við í hesum. Men í løtuni tykist tað vera í so langt millum orðini hjá mentamálaráðharranum og veruleikan. Ein av luttakararnum á ráðstevnini, Niels Jákup Thomsen, stjóri á Bókadeild Føroya Lærarafelags, vísir á, at sum er, eru týðingar av føroyskum bókum bert ein viðfáningur av útgávuarbeiði annars. Tað, sum fyrst av øllum vantar, er, at Mentamálaráðið tekur týðaraøkið í størri álvara við skapa neyðugu karmarnar við eini pengajáttan og starvsfólki, heldur hann. Hann heldur ikki, at talan nýtist verða um stórar pengaupphæddir ella um at skipa ein heilt nýggjan stovn fyri at fáa ferð á hetta arbeiði.

- Vit hava longu hollan kunnleika á økinum í Føroyum, men enn vanta røtu umstøðurnar. Eg ímyndi mær til dømis, at Mentamálaráðið setti eitt fólk, sum burturav slapp at arbeiða við at fáa markanarført og harundir týtt føroyskar bøkur til onnur mál. Tað hevði í øllum førum verið eitt stórt framstig, sigur Niels Jákup.

Bókadeildin luttekur javnan á stórum bókamessum, eitt nú í Frankfurt, har tey fyrst og fremst eru við sum keypparar. Roynt verður tó eftir førimuni at skapa áhuga hjá útlendskum forløgum og týðarum fyri føroyskum bókum. Hetta krevur tó, at neyðuga tilfarið er tókt, so sum týddir samandráttir av føroyskum bókum, presentatiónir av føroyskum høvundum o.a. Men sum er, hevur forlagið hvørki orku ella pening til at gera hetta á nøktandi hátt.

- Og tað er spell, tí týddar bókmentir eru ikki bara ein framúr góður máti at skapa áhuga fyri føroyskari mentan. Lítil ivi er um, at týðingar eisini kunnu verða við til at hækka støðið í føroyskum bókmentum sum heild. Bæði tí ein ávís úrveljing fer fram, men eisini tí avbjóðingin hjá høvundunum verður tess størri við eini breiðari lesarafjøld, sigur Niels Jákup Thomsen.

### Oyramerkt játtan

Urd Johannesen, fulltrúi í Mentamálaráðnum sigur, at hóast ongin ítøkilig ætlan fyriliggur enn, er ongin ivi um, at Mentamálaráðið fer at spæla ein meir virkan leiklut framyvir í marknaðarføringini av føroyskum bókmentum uttanlands.

- Í heila tiki verður hetta økið raðfest hægri í framtíðini. Hvussu arbeiðið ítøkiliga skal skipast er ikki fastlagt enn, men ein kundi ímyndað sær, at ein játtan varð oyramerkt til týðingar burturav, sigur Urd, sum helt tað vera sera áhugvert at hoyra á ráðstevnuni, hvussu langt okkara grannalond eru komin á hesum økinum. Broytingar og øðrvísi raðfestingar í Norðurlanda Ráðharraráðnum komandi árini hava millum annað við sær, at upphæddir verða játtaðar til týðingar av bókmentum á smáu málunum. Men hóast hetta eisini fer at skapa betri karmar fyri arbeiðinum, sum verður gjørt í Føroyum á hesum økinum, fer Mentamálaráðið ikki at sita hendur í favn og bíða.

- Tað er ongin ivi um, at vit mugu verða meir uppsøkjandi enn higartil, til dømis við at bjóða týðarum til Føroyar og í heila tikið við at pleyga tey sambond, sum eru so neyðug í slíkum arbeiði, sigur Urd.

Í løtuni verður bíðað eftir endaligu niðurstøðuni av ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, sum síðani verður tikin við í framhaldandi arbeiðið hjá Mentamálaráðnum.

# Millum idealismu og veruleika

**Føroyski bókamarknaðurin er ein endurspegling av muninum millum idealismu og veruleika. Skal hann kunna sameina kravið um eina mentanarliga og eina fíggjarliga ábyrgd er alneyðugt at raka hárfínu javnvágina millum tað fyrimyndarliga og tað, sum í praksis letur seg gera, segði Martin Næs, landsbókavørður, millum annað á ráðstevnuni**

RÁÐSTEVNA
**Anna V. Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo



*Sambært eini forvitnisligari kanning hjá Martini Næs, landsbókavørði, er bókaútgáva eitt týdningarmikið ískast til føroyskt vinnulív*

Ráðstevnan um marknaðarføring av bókmentum á smáum málum hevði eisini við sær eitt livandi kjak um verandi støðu á føroyska bókamarknaðinum. Í setanarøðuni legði Jógvan á Lakjuni áherðslu á, at meðan marknaðarføring er týdningarmikil, er tað ikki minni átroðkandi, at vit framhaldandi dyrka okkara heimliga bókamarknað. Hann ásannaði samstundis, at korini, hesin marknaður virkar undir, í stóran mun eru treytað av stuðlinum frá politisku mynduleikunum.

### Frítíðarítriv

Í fyrilestri vísti Martini Næs á, at veruleikin er, at man frá almennari føroyskari síðu als ikki hevur satsað uppá at fáa føroyskar bókmentir út á altjóða marknaðin, og at man í heila tikið ikki hevur sýnt føroyskum bókmentum serliga stóran áhuga.

- Hóast føroyski bókamarknaðurin virkar eftir somu prinsippum sum aðrastaðni, er hann fyrst og fremst ein endurspegling av muninum millum idealismu og veruleika. Sjálvandi eigur tað ikki at góðtakast, privatfólk framvegis taka lán fyri at geva verk hjá øðrum út til gagn fyri bæði tað føroyska máli og føroyskan stoltleika. Hinvegin, havandi í huga, at forlagsvirksemi innan eitt nú fagrar bókmentir framvegis er úrslit av frítíðarítrivi hjá nøkrum væl meintum idealistum, hevur støðan higartil stórt sæð verið forsvarlig, segði Martin Næs.

Hetta merkir tó ikki, at hon ikki kundi verið betri, og uttan iva er framvegis nógv at finnast at. Eitt nú vilja atfinningarsamar røddir vera við, at dygdin ofta má gjalda prísin fyri mongd. Men spurningurin er, um mongdin ikki er ein treyt fyri dygd, helt Martin.

### Fjaldu tølini

Í fyrilestrinum vísti Martin Næs millum annað til eina áhugaverda kanning, hann hevur gjørt av føroyska bókamarknaðinum. Sambært kanningini høvdu tveir av stóru føroysku bókahandlunum umframt átta føroysk bókaforløg samanlagt ein ársumsetning uppá knapt 30 milliónir kr í fjør. Hartil eru tølini greið tekin um, at bókaútgáva skapar alsamt fleiri størv innan prent, sølu, frálæru, toll og skatt og bókasavnsarbeiðið fyri bert at nevna nøkur fá øki.

- Við tølum av slíkum slag skuldu vit trúð, at rithøvundar og forlagsfólk kundu farið beinleiðis til almennu mynduleikarnar og víst teimum, at hvussu støðan sær út. Sannført teir um, at um menningin skal halda áfram, er neyðugt at raðfesta arbeiðsumstøðurnar hjá bókaútgávu hægri. Tí tølini vísa nevniliga eisini, at útgávur av føgrum bókmentum ikki vaksa í mun til aðrar bókagreinar. At fleiri útgevarar seta seg í stóra persónliga skuld. At føroysk bókaútgáva er eitt týdningarmikið ískast til føroyskt vinnulív og til landsins skattainntøkur. Og at almennir mynduleikar als ikki satsa uppá at fáa føroyskar bókmentir út á altjóða marknaðin.

At tølini ikki kunnu brúkast til slíkar grundgevingar kemst av at tey ikki eru til – í øllum førum ikki samlað og alment. Tí kennir ongin tey helt neyvu tølini, og tí er tað so trupult at sannføra nakran um nakað við teimum. Tað broytir tó ikki ta sannroynd, at bókaútgáva í veruleikanum er við til at halda føroysku samfelagshjólunum í gongd, segði Martin Næs, landsbókavørður.